

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 04 - 2012

# Sera nógv søkja útbúgving innan oljuvinnu

Í Noregi vilja støðugt fleiri ungfólk sleppa at útbúgva seg innan oljuvinnuna, og nýggj tøl vísa, at í ár eru tað 25 prosent fleiri enn í fjør, sum hava søkt um at sleppa at lesa verkfrøði. Samstundis vísa tølini, at tað er serliga innan oljuøkið, at talið á umsøkjarum er vaksið. Bottom of Form 1 Eftir trimum árum er talið á teimum, sum søkja inn á útbúgving innan oljuøkið, vaksið heili 61 prosent - úr 4.859 í 7.859, skrivar Aftenposten. Men tað eru minni enn so øll, sum fáa játtandi svar, tí lestrarplássini eru alt ov fá samanborið við tað stóra umsøkjaratalið. Í veruleikanum hava teir lærdu háskúlarnir seks umsøkjarar til hvørt lestrarpláss. Raðfesta oljuna fram Marianne Harg, sum er formaður í Tekna, fakfelagnum hjá eitt nú teknologum, sigur við NRK, at tað er sera umráðandi, at so mong sum yvirhøvur gjørligt sleppa at útbúgva seg innan oljuvinnuna. -Vit mugu gera, sum tey ungu vilja. Eg vóni, at teir lærdu háskúlarnir kunnu vera so liðiligir, at teir kunnu taka fleiri næmingar enn nú. Tað kann vera skilagott at raðfesta útbúgvingarpláss frá øðrum yvir til oljuvinnuna, sigur Marianne Harg. Hon heldur, at tað stóra umsøkjaratalið til útbúgvingar í oljuvinnuni kemst av, at har eru fleiri áhugaverd arbeiði at fáa, og at tørvur er á fólki. -Nógv fara frá við pensjón í komandi árum. Talan um arbeiði, har fólk kunnu arbeiða, har tey vilja búgva, og so er lønin góð, sigur Marianne Harg við NRK. Tilsamans hava 115.764 fólk søkt hægri útbúgvingarpláss í ár, og tað er 6,6 prosent meiri enn í fjør.